# Landsliðsárið byrjar

**Henrik Larsen og Jógvan Martin Olsen hava boðsent 25 leikarum til fyrstu landsliðsvenjingarnar, og meðan nøkur fesk andlit eru teirra millum, tykjast aðrir vera settir í kuldan fyribils**

FÓTBÓLTSLANDSLIÐ
*Jákup Mørk*

Hóast veturin enn ikki er byrjaður av álvara, so hava landsliðsvenjararnir í fótbólti longu nú boðað frá, nær farast skal undir venjingarnar til komandi landsliðsárið.

Longu 18. januar verða fyrstu venjingarnar á skránni, tá landsliðið savnast á Toftum, og bara tvær vikur seinni verður Henrik Larsen aftur í Føroyum, tá landsliðið skal savnast í Havn. Tó at tað helst er ov tíðliga á árinum, til at nakrar veruliga bóltvenjingar kunnu gerast, og tó at veturin kanska fer at darva hesum, so plaga hesar venjingarnar at vera eitt gott høvi hjá landsliðsvenjarunum at staðfesta, hvussu ymsu leikararnir eru fyri eftir ein vetur, har tað er misjavnt, hvussu nógva venjing likamið fær.

## Skráin er løgd

Fyribilsskráin hjá landsliðnum er eisini longu løgd, og í stóran mun líkist hendan sær sjálvari. Føstu punktini á hesari eru sjálvandi venjingarlegan sunnanfyri og dystirnir í EM-undankappingini, og her verður talan í ár um iki færri enn fimm dystir. Tvær ferðir verður tað Ísland, sum er mótstøðuliðið, meðan talan verður um ein dyst móti ávíkavist Týsklandi, Skotlandi og Litava.

Sum vit áður hava nevnt, so hevur fótbóltssambandið í Kasakstan sýnt stóran áhuga fyri at koma at koma til Føroya, og nú tykist alt vera komið í rættlag hesum viðvíkjandi. Í øllum førum standa tvinnir dystir millum Føroyar og Kasakstan á skránni, og verða hesir báðir leiktir í Føroyar. Fyrru ferðina verður flaggdagin, og longu tveir dagar seinni tørna londini aftur saman. Her er talan um eitt av teimum liðum, sum vit vanliga kappast við á styrkislistanum hjá FIFA. Har eru Føroyar í løtuni á 113. plássi, og Kasakstan er nummar 117, so á pappírinum átti talan her at verið um tveir javnar dystir, har leikarar okkara ivaleyst kunnu fáa eitt sindur av dystarvenjing og samspælið.

## Nýggj andlit

Sum vant, so er hópurin til hesar fyrstu landsliðsvenjingarnar nakað størri, enn hann er, tá teljandi dystirnir eru á skránni. Nakað sum eisini gevur venjarunum rúmd fyri at síggja onkrar nýggjar leikarar, og hesum høvinum tykist Henrik Larsen at hava tikið av.

Hjá trimum leikarum verður talan soleiðis um fyrstu landsliðsvenjingarnar, sum teir nú skulu í holt við. Bárður Mortansson úr B36, Jann Ingi Petersen úr B68 og Rúni Elttør úr KÍ eru allir bidnir um at koma við, og meðan Jann Ingi er ein av leikarunum, sum hevur veir gjøgnum alla FSF-skipanina við U-landsliðunum, er talan í hinum báðum førunum um toluliga óroyndar menn í so máta.

Hinvegin kundi eisini verið líkt til, at landsliðsvenjararnir við úttøkuni í øllum førum fyribils hava sæð burtur frá nøkrum leikarum, sum áður hava verið inni í landsliðsmyndini.

Teir báðir HB-leikararnir, Janus M. Joensen og Tór-Ingar Akselsen, vóru báðir við til somu venjingarnar í fjør – har Janus annars fekk drúgvan skaða. Men teir eru so ikki millum tey 25 nøvnini hesaferð. Tað eru teir báðir suðuroyingarnir, Dan Mortensen og TB og Palli Augustinussen úr VB, heldur ikki. Heldur ikki hevur rúm verið fyri Arnbjørn Danielsen ella Klæmint Matras úr B36, og spurningurin er so, hvørt talan er um endalig farvæl tli leikarar, ella um talan bert um fyribils steðg í so máta.

Fyri teir flestu av nevndu leikarunum er tó galdandi, at teir enn hava síni bestu fótbóltsár framman fyri sær, og tískil væl kunnu hugsast at verða slúsaðir inn í aftur í hópin einaferð seinni. Hjá Arnbjørn Danielsen sær hinvegin kanska eitt sindur øðrvísi úr. Sum 29 ára gamal skuldi hann júst nú verið í hæddini sum fótbóltsleikari, men rúm hevur so ikki veirð fyri honum hesaferð.

Akkurát, hvussu endaligur heisni 25 manna hópurin er, ber illa til at staðfesta enn. Skaðar og aðrar forðingar kunnu væl hugsast at gera sína ávirkan, so teir, sum í fyrsta umfari eru sáldaðir frá, skulu kanska halda seg klárar, soleiðis at teir eru til reiðar, um boð brádliga skuldu verið eftir teimum.

Teir 25, sum nú hava fingið boð um at koma til venjingar eru annars hesir: Hans Fróði Hansen, Fróði Benjaminsen, Jann Ingi Petersen, B68, Jens Martin Knudsen, Pól Thorsteinsson, Sjúrður Jacobsen, Helgi L. Petersen, NSÍ, Sámal Joensen, Súni Olsen, GÍ, Jón Rói Jacobsen, Andrew av Fløtum, Jóhannis Joensen, Rógvi Jacobsen, HB, Óli Johannesen, TB, John Petersen, Jákup á Borg, Jens Kristian Hansen, Julian Johnsson, Bárður Mortansson, B36, Hjalgrím Elttør, Ove Nysted, Meinhardt Joensen, Atli Danielsen, Rúni Elttør, Heðin á Lakjuni, KÍ



*Bárður Mortansson, sum nú spælir í B36, hevur í fleiri ár verið fastur maður í hópinum hjá ávíkavist HB og B36, og nú er hann fyri fyrstu ferð biðin um at koma til landsliðsvenjingar*

## Fyribils skrá hjá A-landsliðnum fyri 2003

| | |
|---|---|
| 14.02-23.02 | Venjingarlega í Spania |
| 23.04-27.04 | Føroyar Kasakstan (25.04 og 27.04) |
| 04.06-08.06 | Ísland-Føroyar (07.06) |
| 08.06-11.06 | Føroyar-Týskland (11.06) |
| 18.08-20.08 | Føroyar-Ísland (20.08) |
| 03.09-07.09 | Skotland-Føroyar (06.09) |
| 07.09-10.09 | Føroyar-Litava (10.09) |



# Við aftur

**Eftir eitt hondbóltsheyst, sum byrjaði við einum bein- og vónbrotið er Mortan Hansen nú komin somikið væl fyri seg, at hann av álvara tykist nærkast einum føstum plássi á A-landsliðnum**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*

Tá hondbóltsárið byrjaði var líkt til, at hetta skuldi gerast ein sera minnisríkur vetur fyri Mortan Hansen. Stirkuspælarin hjá Tjaldrinum.

Tað er tað sum so eisini blivið til, men als ikki á tann hátt, sum roknað varð við.

Eftir venjingarleguna hjá landsliðnum varð hann í september mánaði boðin til Íslands, har Þór á Akureyri sýndi áhuga fyri leikarunum, men síðani gekk alt galið. Eitt beinbrot forkom øllum møguleikum at gera seg galdandi í Íslandi, og tá gipsið ikki varð tikið av fyrr enn um hálvan oktober, tóktist alt tos um landslið og undankappingardystir eisini rættiliga fjart hjá honum.



*- Vit mugu bara ásanna, at tað gekst stak illa í dag, og fyri mítt viðkomandi kann eg bara siga, at hetta er vánaligasta landsliðsavrikið, sum eg havi verið við til, var kontanta eftirmetingin hjá Mortani Hansen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Var heppin

Sunnudagin taldist hann tó millum fáu glottarnar á føroyska hondbóltslandsliðnum, og tó at hann als ikki var nøgdur um avrikið, so dugdi hann tó at fegnast um, at hann longu nú aftur er partur av A-landsliðnum.

- Eg skal ikki siga, at eg visti av ongum, tí ein mánað eftir beinbrotið fekk eg at vita, at eg framvegis var við í hópinum, og tað var sjálvandi nakað, sum eg fegnaðist um. Hinvegin er tað nakað ímillum at vera við í bruttohópinum, og so tað at vera við til sjálvar dystirnar, og heilt erligt, so trúði eg lítið upp á hendan møguleikan, tá eg framvegis gekk í gipsi. Talan gjørdist tó um fleiri skaðar, og strikuspælarar er ikki akkurát nakað, sum hongur á trøunum í føroyskum hondbólti, so eg slapp so kortini upp í part.

## Vánaligt

Um sjálvt avrikið hjá landsliðnum ímóti Finnlandi, segði Mortan, at hetta var beinleiðis vánaligt.

- Vit mugu bara ásanna, at tað gekst stak illa í dag, og fyri mítt viðkomandi kann eg bara siga, at hetta er vánaligasta landsliðsavrikið, sum eg havi verið við til.

Tosað varð annars um, at Føroyar møguliga kundu gera okkurt við Finnland eftir dystin har yviri, og Mortan sigur sjálvur, at hann eisini trúði upp á møguleikan.

- Eg skal ikki siga, at eg roknaði við einum sigri, men ein spennandi dyst hevði eg avgjørt vónir um. Har yvir eydnaðist okkum sera væl at dempa spælið hjá teimum, soleiðis at teir ikki komu ígongd, men í dag var tað júst øvugt. Finnlendingarnir stýrdu dystinum fullkomuliga, og tað kunnu vit altso ikki loyva okkum.

Longu fríggjadagin skal føroyska hondbóltslandsliðið aftur í eldin, men hóast kjaftfiskin sunnudagin, so tóktist Mortan Hansen á ongan hátt at hava mist vónina.

- Nei. Vit hava fimm dagar, og so mugu vit bara koyra á. Annað er ikki at gera, vóru seinastu orðini, sum vit fingu á vegnum.

## Aarhuus vil hava Nocko

Nocko Jokovic, sum í fjør var við til at vinna FM-heitið saman við HB, hevur síðani hetta gingið sáttmálaleysur í Danmark. Vónin hevur alla tíðina verið, at okkurt felag fór at sýna áhuga, tá sonevnda transfer-vindeygað opnaði aftur, og nú røkist kanska fyri, at okkurt fer at spyrjast burturúr.

Í øllum førum skrivar BT nú, at fyrstudeildarfelagið, Aarhus Fremad hevur havt samráðingar við álopsleikaran, og at formaðurin í felagnum hevur vónir um, at Nocko Jokovic verður at síggja í hópinum komandi kappingarárár.

Sjálvur hevur Nocko tó ikki hug at gera viðmerkingar til hetta, og tí stendur enn óvist, hvar fótbóltsleið hansara skal ganga komandi mánaðirnar.

**-jm**

Fyrrverandi landsliðsvenjari:

# Hevði vónir um meira

**Millum áskoðararnar í Ítróttarhøllini á Hálsi sunnudagin taldist eisini fyrrverandi landsliðsvenjarin, Palli Joensen, og hann hevði avgjørt vónir um eitt frægari úrslit enn tað, sum talan gjørdist um**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*

Eftir teir seks undankappingardystirnar, sum ta ferðina vóru á skránni, segi táverandi venjarin, at tað serliga vóru tvey øki, har føroyingar vóru eftirbátar. Annað av hesum vóru royndirnar, og tað er so sjálvandi nakað, sum bara kann koma við fleiri dystum, og so var tað eisini kropsligi parturin. Her vísti Palli ta ferðina á, at hetta ikki er nakað, sum kann broytast eftir einum degi, men var tað hansara vón, at eitt langsiktað arbeiði fram yvir varð sett í verk, sum kundi bøta um hendan partin.

## Sást ikki aftur

Nú hevur landsliðið í knappliga eitt ár havt servenjar knýttan at sær. Júst við kropsliga partinum fyri eyga, men hóast hetta, so gjørdist talan sum kunnugt ikki um nakað serliga gott úrslit fyri okkara viðkomandi í dystinum sunnudagin.

Spurdur, hvørt kropsliga venjingin hjá leikarunum enn ikki hevði givið nóg sjónligt úrslit, var Palli eitt sindur ivandi.

- Nú hevði eg ynskt, at eg hevði eitt meira positivt úrslit at grunda svarið hjá mær á, men í dag sást í øllum førum ikki so nógv til hendan partin. Í øllum førum ikki so nógv, sum eg hevði vónir um. Eg veit ikki rættiliga, um eg yvirhøvur skal tora at úttala meg um júst tað, tí eg veit, at nógvir av leikarunum hava gjørt sera nógv við hendan partin av venjingini alt árið, og tí hevði í øllum førum verið ynskiligt, um tað sást betri aftur. Eisini tí eg veit, at leikararnir hava meira í sær enn tað, sum teir vístu í dag.

- Og tá tosað verður um royndir, so er tað sjálvandi so, at hesar bert kunnu koma við fleiri dystum, men kortini haldi eg eisini, at nakað restar í í fyrireikingunum. Eg hugsi meira um uppgávur, sum kunnu brúkast til at skerpa leikararnar beint undan stóru uppgávunum. Vit sóu eitt nú millum jól og nýggjár, at meðan leikararnir fingu ein góðan dyst móti útlendsku leikarunum, so var dysturin móti pressuliðnum ikki nakað, sum gav tað heilt stóra.

- Her vóru dystirnir móti Grønlandi sjálvandi góðir, men eg kundi hugsað mær, at leikararnir eisini fingu roynt seg móti sterkari mótstøðu undir eitt sindur meira fríum forholdum, soleiðis at spælistílurin kundi verið betri vandur. Kanska nakað í stíl við venjingarleguna, sum teir vóru á í Íslandi. Tað veldst so sjálvandi eisini um pengar, men tað er í øllum førum nakað, sum kundi viðvirkað til, at leikararnir vóru betri fyri, tá veruligu uppgávurnar koma.

## Ov bangnir

Um dystin sjálvan helt Palli, eins og flestu onnur í høllini mundu halda, at hann var eitt satt vónbrot fyri føroyska liðið.

- Tað týdningarmesta mistakið, sum føroyska liðið framdi, haldi eg, var at teir vóru ov bangnir. Verjan stóð mest sum alla tíðina og bíðaði eftir, hvat mótstøðumenninir skuldu gera, heldur enn at koma nakað út ímóti teimum. Og tað er so ikki nakað, sum tú gert órevsaður, tá mótstøðuliðini hava slíkar skjúttar. Hetta viðførdi eisini, at tað var ógvuliga avmarkað, hvat føroyska liðið fekk av teimum løttu málunum, sum ofta koma við kontra. Verjuspælið var ov passivt, og tí gjørdust kontramøgleikararnir so fáir í tali. Og at leikararnir so eisini misnýta so stóran part av teimum opnu møguleikunum, sum komu, er bara stórt spell. Tað kundi í øllum førum pyntað um úrslitið.

- Yvir høvur haldi eg, at hesin væntandi aggressiviteturin var alt ov sjónligur á liðnum. Eitt nú merkti tú eisini í álopspartinum, at spælararnir mest sum alla tíðina spældu flatt, heldur enn at hótta eitt sindur meira. Tá verður tað alt ov lætt hjá mótstøðuni at verja, og tí komu vápnini hjá føroyingunum heldur ikki til sín rætt. Eitt nú kom Ingi ongan tíð inn í dystin, og hondina á hjartað, so hevði eg fegin sæð Svein Justinussen fingið meira tíð á bakplássinum, enn hann fekk í dag. Tað var sjónligt, at Ingi varð væl ansaður, og hann fekk mest sum einki burturúr, og Sveinur gjørdi tað gott, tá hann var á plássinum, helt fyrrverandi landsliðsvenjarin.

Og áðrenn hann endaði, so hevði hann eisini eitt lítið nevs til áskoðararnar.

- Tað er eitt sindur hugstoytt, at so nógvir áskoðarar ikki kunnu geva liðnum ein betri stuðul. Tað vísur seg bara alt ov ofta, at so skjótt sum mótstøðan dregur nakað frá okkara liði, so hvørvur stuðulin, og tað er helst júst tá, at leikararnir hava største tørvin á honum, var seinasta hjartasuffi frá Palla Joensen.



*- Eg veit at nógvir av leikarunum hava gjørt nógv við venjingina seinastu tíðina, og tí hevði eg vónað, at avrikið fór at verða betri enn hetta, tí teir hava meira í sær, helt Palli Joensen eftir landsdystin sunnudagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*